# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Forlongt løgtingsvalstríð

Danski forsætisráðharrin, Anders Fogh Rasmussen hevur skrivað út fólkatingsval at vera um tríggjar vikur. Hetta kemur sera dátt við hjá føroyskum veljarum og politikarum, tí vit skulu um nærum somu tíð til at fyrireika okkum til eitt løgtingsval. At fólkatingsvalið kemur áðrenn eitt løgtingsval má sigast at vera sera óheppið. Nógvir føroyingar leggja ikki so nógv í, hvussu fólkatingið verður mannað og tíansheldur ikki, hvørji umboð verða vald úr Føroyum. Tað er eisini sera avmarkað fyri okkum, sum her búgva, hvønn týdning eitt fólkatingsval hevur fyri okkara gerandisdag og framtíð. Tað er ikki á fólkatingi, at vit skulu menna okkum sum tjóð. Vit hava tó rættin til at velja tvey umboð.

Fyri okkum er løgtingsvalið tað, sum hevur týdning. Tað skuldi tí heldur verið øvugt, at vit fyrst fingu eitt løgtingsval. Út frá úrslitinum av tí kundu vit so funnið okkara bestu umboð at senda til danska fólkatingið. Men tað fáa vit so ikki gjørt so nógv við, tó at tað fer at kennast løgið fyri okkum øll, at politiska skipanin og allur kjakpallurin í Føroyum nú skal gierast til at senda umboð til eitt danskt ting, nú tað er so nógv, sum leikar á her hjá okkum sjálvum.

Fólkatingsval verður 13. november, løgtingsval verður 19. januar. Føroya fólk kann tí eins væl longu nú gera sær greitt, at løgtingsvalstríðið er byrjað. Tí veruleikin verður so helst tann, at valið til fólkatingið fer at kennast sum ein forsmækkur ella upphiting til løgtingsvalið, soleiðis at vit tá samanum kemur í veruleikanum seta hol á komandi løgtingsval longu nú fólkatingsval er útskrivað. Vit fáa tí eitt forlongt løgtingsvalstríð.

Gott ella ikki! Vit fáa so undir øllum umstøðum møguleika at fáa lýst og debaterað bæði stór- og smámál, soleiðis at grundarlagið hjá veljarunum at kjósa ikki bert tvey umboð á danating, men eisini tey røttu 33 fólkini at stýra landinum komandi fýra árini, skuldi kunnað verið munagott.

**Sosialurin**

## Rúgva av góðum vælferðarpolitiskum málum komin í Løgtingið

**HANS PAULI STRØM**
landsstýrismaður



Í hesum mánaðinum - og serliga seinastu dagarnar – hevur undirritaði borið eina rúgvu av góðum vælferðarpolitiskum málum niðan í Løgtingið. Vit hava kýtt okkum í Almanna- og heilsumálaráðnum fyri at fáa øll tey nógvu málini frá hondini, sum vit hava sett okkum fyri at loysa í hesum umfari, og tað er ikki so lítið sum sæst niðanfyri. Eini tvey-trý mál eru eftir og koma í næstu viku.

**Lutaíbúðafeløg:**
lógaruppskotið um lutaíbúðafeløg er tað størsta av øllum, og óivað størsta bústaðarpolitiska frambrot síðan Húsalánsgrunnurin kom í trýssunum. Við uppskotinum kemur eftirfylgjandi nýskipanin av fíggjarliga ábyrgdarstovninum, og broytingin av mvg- og rentustuðulslógini.

**Vardir bústaðir:**
uppskot um at kunna skipa lutaíbúðir sum vardar bústaðir fyri fólk við serligum tørvi.

**Leigulóg:**
uppskot til fyrstu leigulóg fyri Føroyar, við fylgilóg um lagaligar skatting av leiguinntøkum til tess at økja útboðið av leiguíbúðum.

**Sjúkrakassaskipan:**
uppskot um eina nýggja felags sjúkrakassaskipan fyri Føroyar

**Barnsins 1. sjúkradagur:**
uppskot um at eisini tímalønt fáa lønarendurgjald fyri at vera heima barnsins fyrsta sjúkadag.

**Endurbúgving:**
uppskot um at geva betri atgongd til endurbúgving, so at stuðul til endurbúgving skal vera óheftur av inntøku og ogn hjúnafelags. Hetta uppskot er framlagt og verið gjøgnum 1., 2. og endaliga samtykt við 3. viðgerð uttan at ein einasti fjølmiðil hevur tikið tað upp á tungu !!!

**Viðbót til pensjonistar:**
uppskot um at hækka viðbótina til ávísar pensjonistar (fyrr nevnd brenni- og samskiftisviðbótin) úr 5.556 kr til 6.924 kr. árliga. Hetta hevur verið til 1. viðgerð í løgtinginum í dag.

**Stakir uppihaldarar:**
uppskot um veita serligt barnagjald til stakar uppihaldarar uppá 6.000 kr. árliga.

**Vaksinatión:**
uppskot um ókeypis vaksinatión til pensjonistar. Er sett í verk.

**Fyritíðarpensjonistar:**
uppskot um at veita lægstu fyritíðarpensjonistum serliga viðbót, sum 1. jan. 2008 verður 15.000 kr. árliga og 30.000 árliga frá 1.jan.2009. Samstundis verður mótrokningin av aðrari inntøku minkað úr 60 niður í 30%.

**Fólkaheilsuráð:**
uppskot um at Fyribyrgingarráðið verður til Fólkaheilsuráðið og fær til uppgávu at fremja fólkaheilsuætlan landsstýrisins.

**Sambýlið fyri sálarsjúk í Tórshavn:**
verklagslóg um at byggja nýtt sambýli fyri sálarsjúk, 16 mió. kr. til fyrsta byggistig við 10 plássum av 16 tilsamans.

**Økisdepil fyri sinnisveik í Suðuroy:**
verklagslóg um økis- og sosialpsykiatriskan depil fyri 24 mió, harí eisini eru 10 búpláss.

**Psykiatrilóg:**
uppskot til nýggja psykiatrilóg fyri ta gomlu frá 1938. Uppskotið verður væntandi borið niðan í tingið í komandi viku.

**Tubbakslógin:**
uppskotið um alment roykibann í Føroyum liggur klárt og bíðar eftir endaligari tilsøgn til at tað kann verða borið niðan í løgtingið

**Fólkapensjónin:**
arbeitt verður við uppskoti um at minka mótrokningina í fólkapensjónsviðbótini av aðrari arbeiðsinntøku, úr 60 niður í 30%.

Nú vóni eg sjálvsagt at Løgtingið fær høvi og frið til at viðgera øll hesi góðu mál, so tey kunnu verða samtykt og fáa gildi, til frama fyri betri kor og vælferð hjá føroyingum.

## Nýggj byrjan: Vit vinna fólkatingsvalið

**JOHN JOHANNESSEN**
www.john.fo



Javnaðarflokkurin skal nú kasta keðiliga hamin av sær. Vit skulu hava eina nýggja byrjan væl kjølfesta í gomlu sosialdemokratisku virðunum.

Ein nýggj byrjan við greiðum boðum uppá dagsins og morgindagsins avbjóðingar. Ein nýggj byrjan, sum ikki er ein høgrasnaring. Tvørturímóti skulu vit leggja enn størri dent á traditionellu sosialdemokratisku virðini, men í nýggjum hami við greiðum boðum uppá avbjóðingarnar í nútíðar og í framtíðar samfelagnum.

Hetta er mítt boð til landsfundin. Vit skulu aftur verða kend sum ein nýmótans og væl umtóktur flokkur, ið hevur tætt samband við veljarafjøldina.

Landsfundurin skal vera startskotið til nýggju byrjanina. Fyrsta úrslitið skal vera, at vit vinna Fólkatingsvalið. Sjálvur ætli eg mær at leggja stóra orku í hetta arbeiðið. Og eg ætli mær avgjørt á fólkating...

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.